**Magnus Heinason - Túrfrágreiðing**
**Standard hydrografi. Túrur nr. 1002**
**Tíðarskeið 18/02-23/02-2010**

---

**Fólk frá Havstovuni:** Mourits M. Joensen og Regin Kristiansen.

**Ábyrgd:** Bogi Hansen

**Endamál:** Endamálið við túrinum var at fylgja við broytingum í havinum kring Føroyar. Túrurin var ein partur av teimum regluligu kanningunum eftir teimum fýra standardskurðunum.

**Reiðskapur:** Seabird-CTD við rosettu, WP2-glúpur, termistor-keta og ein streymmátari.

**Um túrin:** Vit fóru út hósdagin 19/2 kl.1800. Siglt varð eystur á støð N1, har vit byrjaðu skurðin og tóku støðirnar norðureftir, vit tóku allan skurðin, norður á 64°30N.
Tá liðugt var at taka støðir á skurði N, sigldu vit í Vesturhavið, har vit løgdu ein streymmátara suður úr Mykinesi, á pos. 61°53,95N-007°34,86V dýpið var 125 m. Tá mátarin var komin út, tóku vit eina CTD-støð uppi yvir mátaranum. Síðani sleipaðu vit thermistor-ketuna uppi yvir mátaranum.
Tá liðugt var at sleipa, sigldu vit vestur á støð V19 norður av Føroyabanka. Har byrjaðu vit skurð V og hildu so fram við skurðinum inn ímóti Trøllhøvda.
Tá hesin skurður var liðugur, varð siglt suður á Munkagrunnin. Vit tóku skurð S av Munkagrunninum og móti Hetlandi, men bert til oljufeltið. Haðani sigldu vit so norður á skurð E, sum vit tóku inn móti Nólsoy.
Alt riggaði, sum tað skuldi, og alt gekk væl, hóast veðrið var vánaligt onkran dag á túrinum.
Vit vóru aftur á Havnini týsdagin 23/2 kl. 1300.

**Prøvataking:** Við Seabird CTD-ini tóku vit 50 støðir og saltprøvar á øllum. Við glúpinum tóku vit 46 støðir.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Saltprøvarnir verða analyseraðir í vár.

**Viðmerkingar:**

2-3-2010 ____________________________
Regin Kristiansen

Vend



Støðir og kósir á túri 1002